# TILTØK

**Gudstænastur Leygardagin**
*Christianskirkjan:* kl. 15, Jólahugni fyri eldri

**Sunnudagin 12. des. 3. sunnud. í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal.
*Kl. 14:* Lusiogongd og gentukór úr Meinigheitshúsinum, Sverri Steinholm.
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hestur:* kl. 15 altarg., Berdur D. Joensen
*Hósvíkar kirkja 75 ár, kl. 11:* Hátíðargudstænasta við Hans J. Joensen, biskupi og Mogens T. Christensen. Kl. 16 kirkjugongd við Kingosangi, kór- og solosangi og Lusiagongd
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, liturgisk 7-lestra gudstænasta. Martin R. Jacobsen
*Glyvra kirkja:* kl. 11, lestur. Kl. 20 »Vit syngja jólini inn«. (Kór Glyvra kirkju, solosangur og floytur)
*Søldarfjørður:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Selatrað:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Elduvík:* kl. 12,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs
*Funningur:* kl. 12, messa, Emil Olsen
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen
*Christianskirkjan:* kl. 11, Øssur Kjølbro
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels P. Danielsen
*Viðareiði:* kl. 12, altarg., Elsa Funding. (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna)
*Bønhúsið Øravík:* kl. 12, altarg.,
*Tvøroyri:* kl. 16.30, Vit syngja jólini inn, 9-lestra gudst. Jónsvein Bech

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti,kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti við barnasigning og Lucia framsýning, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Egil Joensen.

**Aglow, Tórshavn**
Jólafundurin verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 11. des. kl. 19.30, Bodil og Malmberg Olsen luttaka, sangur við Magna Christiansen. Kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Havnar Kirkja**
**Heystkonfirmatiónirnar 2005**
Tey, sum skulu konfirmerast á heysti 2005, skulu møta í Havnar kirkju týsdagin 14. des. kl. 15.00. Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin 12. verða jólaveitslurnar fyri børnini. Børn til og við 1. flokk kl. 15.00. Frá 2. flokki og uppeftir kl. 17.00. Einki møti verður vegna jólaveitslurnar.

**Fríkirkjan Oasan**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 16 Jólafest hjá Sunnudagsskúlanum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bienkowski, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagssskúli og kl. 12 verður eisini møti. Richard Schwartsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 19 verður tiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 17 í KFUK: Eldrasamkoman við Emil Olsen, presti. Skótar og títtlingar spæla jólaleik og ganga lusia. Vit fáa nátturða.
Týsdagin kl. 17: Várgleði fyri børn. Hetta er seinastu ferð fyri jól, og vit gera eyka burturúr.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti, missiónsmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Sam Jakobsen, evnið er: »Eitt praktiskt kristinlív í familjuni« 2. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin og breakthrough worship.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, har verður serstøk sangløta. Á tilbiðjanarmøtinum talar Jóhan Syderbø um »Hugleiðingar um Jesu føðing. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Øll eru vælkomin.
www.livdin.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Jóla- og barnagudstænasta í Havnar kirkju, Gentukórið luttekur.
Sunnukvøldið kl. 18 Jólafest.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Thomas J. Askham, Steintór og Tórbjørn syngja. Innsavnan til húsið.
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18, Ólavur Jacobsen talar. Náttúrði verður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Haldarsvík**
Familjumøti verður sunnudagin kl. 14.30 v/ familjuni Brend úr Havn.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Leygardagin 11. des. kl. 20 verður Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Hanskristian Justesen. Aftaná verður dekka og hugnalig samvera.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Dávid í Lág.
Sunnudagin kl. 17 Barna- og familjujólafest (náttúrði aftaná – øll taka við). Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli við Adventshugna. Kl. 18 Møti, innsavnan til húsið.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Egil G. Olsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl. 20, Hans Kristian Justesen úr Havn luttekur á møtinum. Hetta er samstundis seinasta ungdómsmøti fyri jól og vit fara at hava jólahugna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 verður Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor. Kl. 15.15. venur Barnakórið og kl. 18 Sang- og vitnimøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Henry Christiansen.
Ungdómsmøti kl. 21 v/ Marius Jacobsen.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Sjómanskvinnuringinum, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 15 Jólafest fyri børn.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Fríðtór Debes.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hanus Lassen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna tað, at jólini verða sungin inn.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Jólahugni verður fyri sunnudagsskúlabørnum og foreldrum teirra í Missiónshúsinum í Porkeri sunnudagin 12. des. kl. 14.30. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, tann seinasti í ár, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti, Streingjakórið syngur, Eyðun Christiansen talar.

**Evangel. fundur í DK**
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 12. des. kl. 17 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Á øllum hesum fundum syngur yngra Kvartettin úr Betesda, Klaksvík. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar borðreiða vit við kaffi og føroyskum viðskera. Børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 13. desember*
kl. 10-12 Opið hús
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl.
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
kl. 15 Vitjan frá Tilhaldinum av Sangi
*Týsdagin 14. desember*
kl. 10.00–15: Vit syngja (skúlabørnini ganga Lucia). Øll eru hjartaliga vælkomin

# BRÚDLEYP

Leygardagin 18. desember kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Dagmar í Heiðunum, Saltangará og Ólavur Jakobsen, Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl.19.00.

Leygardagin 18. desember kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni, Maibritt Mortensen úr Hósvík og Hans Anfinnson Norðfoss úr Havn. Opið hús verður í KFUK í Havn frá kl. 20.00.

Fríggjadagin 31. desember kl. 11.00 giftast í Ebenezer, Gvøðny Steensen, Tórshavn og Janus Gunnarsson, Kollafjørður. Aftaná vígsluna verður móttøka í Ebenezer. Brúdleypsveitslan verður fyri innbodnum í Missiónshúsinum í Kollafirði kl. 18.00.

# GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 19. desember hava hjúnini Sigrid og Absalon Jacobsen í Vági gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Stóra Pakkhúsið frá kl. 10-16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 15. desember hava Fina og Absalon Hansen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima á Bumshamarsvegi 36. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setir lív sítt til fyri seyðirnar.*

*Jóhs. 10,11*

Hirðamyndina kenna vit ymsastaðni frá í Bíbliuni. Hin góði hirðin hevur umsorgan fyri seyðum sínum. Jesus er hirðin og vit, hin kristna kirkjan, eru seyðirnir. Alt Jesu lív vitnar um, at hann hevur umsorgan fyri okkum. Hann gjørdist menniskja fyri at vit ikki skuldu sigla okkara egna sjógv uttan vón um frelsu og eitt meiningsfult lív í hesum heimi.

Langafríggjadagur og páskamorgun bera á sama bógv. Jesus vil, at vit ikki skulu liva og doyggja uttan vón. Og hesin Jesus, sum vit kalla hin góða hirðan, hevur opinberað fyri okkum Gud. Gud er so sum Jesus er. Hesin Gud, sum er hin góði hirðin, er kærleiksfullur, náðigur og miskunnsamur. Hann tekur sær av okkum, hini kristnu kirkjuni ella hann tekur sær av seyðunum. Tú og eg kunnu rokna okkum uppí seyðirnar, tað vil siga, vit eru elskað av Jesusi og hann hevur umsorgan fyri okkum. Hví hevur hesin Gud okkara, Jesus, kærleika til okkara? jú, tí hann hevur skapað okkum. Vit eru skaparverk hansara og tí hevur hann krav uppá okkum. Hann syrgir fyri okkum bæði andliga og tímiliga.

Vit eru Guds skapningar og tí hevur hann krav uppá okkum. Jesus eigur okkum og hann vil ikki, at vit skulu fara til grundar. At taka henda Jesus í álvara og at taka hann uppá orðið er at trúgva. At trúgva er at geva hesum skapara og frelsara okkara pláss í lívinum. Og tað er at tulka lív sítt út frá hesum kærleikans Gudi. Tað er at taka við hesum kærleika í trúgv og tað er at geva henda kærleika víðari til tann neyðstadda, forfjónaða, vrakaða og útstoytta. Hesin Jesu kærleiki kom til sjóndar á krossinum og uppreisnini og vit eiga hann við at geva hann víðari til onnur. At vera kristin er at móttaka og geva, ella lívið er gáva og uppgáva. Og alt eiga vit frá Jesusi, hinum góða hirðanum.

Hann gevur kærleika og ger okkum før fyri at geva kærleika til onnur.

**David Johannesen**